

# NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK JANUAR 2004**

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00 og sunnudagar kl. 14.00-17.00**
**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**

## SKRÁIN

| | | |
|---|---|---|
| **Hósdagur 01.** | **Húsið er stongt til og við 4. januar 2004** | |
| **Fríggjadagur 09.** | **Føroyskur barnadansur** Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið í Føroyum | **Kl. 20.00** |
| **Sunnudagur 11.** | **Nýggjárskonsertin 2004** eykakonsert | **Kl. 16.00** |
| **Sunnudagur 11.** | **Nýggjárskonsertin 2004** Fyrireikarar: Føroya Symfoniorkestur (FO) Útvarp Føroya, Sjónvarp Føroya og Norðurlandahúsið í Føroyum. Konsertin verður send beinleiðis í ÚF og SvF | **Kl. 19.00** |
| **Mikudagur 14.** | **Norrøna Felagið í Føroyum** Zakarias Wang (FO) heldur fyrilestur um Kielarfriðin 1814 | **Kl. 19.30** |
| **Fríggjadagur 16.** | **Føroyskur barnadansur** Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið í Føroyum | **Kl. 20.00** |
| **Leygardagur 17.** | **Listaframsýning:** 8 listafólk úr Suðurjútlandi/Suðurslesvig (DK) Fyriskipari: Nordisk Informationskontor i Sønderjylland | **Kl. 14.00** |
| **Sunnudagur 18.** | **Løgtingsvalið 2004** Fyriskiparar: Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya Valsendingin verður send beinleiðis í ÚF og SvF | **Kl. 19.00** |
| **Mikudagur 21.** | **Húsið stongt fyrrapart** - letur upp | **Kl. 13.00** |
| **Mikudagur 21.** | **KLIPP Filmsfelag Norðurlandahúsins** sýnir virðislønta filmin "Nói, Albinói" leikstjóri Dagur Kári (ÍS) 90 min | **Kl. 20.00** |
| **Fríggjadagur 23.** | **Føroyskur barnadansur** Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið í Føroyum | **Kl. 20.00** |
| **Fríggjadagur 23.** | **Master class sangskeið** við Catherine Sadolin (DK) Fyriskipari: Føroyski Sangskúlin | **Kl. 17.00** |
| **Leygardagur 24.** | **Master class sangskeið** heldur fram | **Kl. 10.00** |
| **Sunnudagur 25.** | **Master class sangskeið** heldur fram, síðsti dagur. | **Kl. 14.00** |
| **Fríggjadagur 30.** | **Føroyskur barnadansur** Dansifelagið í Havn (FO) og Norðurlandahúsið í Føroyum | **Kl. 20.00** |
| **Leygardagur 31.** | **Lægens Bord** Fyrilestur við Peter Q. Geisling (DK) Fyriskipari: IRIS | **Kl. 15.00** |



## Barnadansur á 21. árið

Í vetur verður aftur skipað fyri Barnadansi í Norðurlandahúsinum. Hetta er einogtjúgunda árið á rað og harvið drúgvasta tiltakið í søgu húsins. Dansað verður hvørt fríggjakvøld kl. 20.00 í Dansistovuni. Endamálið við hesum tiltaki er at læra børnini kvæðaskap okkara og harvið kveikja teirra áhuga og varðveita kvæðini sum ein livandi part av mentan okkara. Tað er Dansifelagið í Havn og Norðurlandahúsið, sum øll tjúgu árini hava skipað fyri barnadansinum í Dansistovuni í Norðurlandahúsinum. Vónandi møta børn og foreldur framhaldandi fjølment upp.


Zakarias Wang

## Zakarias Wang um Kielarfriðin

Mikudagin 14. januar klokkan 19:30 fer Zakarias Wang at halda almennan fyrilestur um Kielarfriðin í 1814. Tað er dagin fyri 190 ár síðani, at Kielar-friðurin varð staðfestur hin 14. januar 1814. Partarnir øðrumegin vóru Eystur-ríki og onnur stórveldi og hinumegin Danmark-Noreg. Danmark skal lata Noreg til Svøríki. Svenski kongurin Karl Johan heldur fram at stríðast, til danski kongurin Fríðrikur 6. letur honum alt Noreg. Stórabretland fær Helgoland, meðan Danmark fær svenska Pommern við Rügen. Noreg góðkendi ikki Kielerfriðin, men stovnaði eitt sjálvstøðugt ríki 17. mai sama ár. Danmark lovaði í stríðnum at slita við Napoleon og ger út eitt stórt herlið. Norrøna Felagið í Føroyum skipar fyri fyrilestrinum.


Nina Pavlosky

## Nýggjárskonsertin 2004

Nýggjárskonsertin 2004 verður hildin í Norðurlandahúsinum sunnudagin hin 11. januar 2004 klokkan 19:00. Henda konsertin verður sum vant send beinleiðis í útvarpi og sjónvarpi. Eykakonsert verður sama dag klokkan 16:00. Tað verður Martin Mouritsen, sum stjórnar Føroya Symfoniorkestri. Solistar eru Nikolaos Kapnas, violin, Nina Pavlosky, sopran og Niels Jørgen Riis, tenor. Eisini luttekur Tórshavnar Manskór hjá Bjarna Restorff.

*Nýggjárskráin hjá Føroya Symfoniorkesturi fevnir um hesi verk:*

C. Saint Säens: Introduktión og Rondo cappricioso (violin)
J. Strauss: Gipsy Baron
E. Waldteufel: op 191 Eustudiantina
J. Brahms: Ungarskur dansur no 5
G. Meyerbeer: Coronation March úr "Le Prophete"
J. Strauss: Unter Donner und Blitz polka op 324
R. Wagner: Forspæl til 3. akt "Lohengrin"
R. Wagner: Pílagrímskórið "Tannhäuser"
Prokofiev: op 33 marsjur úr "Love for Three Oranges"
F. Lehar: úr Land des Lächelns "Dein ist mein ganzes Hert" (tenor)
G. Puccini: úr Tosca duettini "Mario, Mario" (sopran og tenor)
E. Kalman: úr Gräfin Maritza "Glucklichst mein Herz" (sopran)
F. Liszt: 4. satsur úr Faust Symfoniini (tenor og manskór)

## Listafarmur


Lembrecht Madsen

Undir heitinum "Skibet er ladet med..." sýna átta listafólk úr Suðurjútlandi og Suðurslesvík fram í Norðurlandahúsinum í Føroyum hin 17. januar 2004. Seinni verður sama framsýning í Íslandi, har hon sæst á listasavninum Hafnarborg og í listafelagnum Gilfélagið á Akureyri.

Tá framsýningin letur upp í Føroyum, verða tey trý listafólkini Nis Vollertsen, Viggo Böhrnsen-Jensen og Bente Sonne til staðar. Saman við teimum er fyriskiparin Anette Jensen.

Í Hafnarborg í Hafnafirði verður fernisering hin 20. mars 2004. Tá verða trý onnur listafólk til staðar. Umframt tey áðurnevndu listafólkini luttaka hesi fimm: Lembrecht Madsen, Luehrsen, Mogensen, Schroeder og Towle.

Fyrireikararnir, sum eru tey bæði Anette Jensen frá Norðurlendsku Kunningarstovuni og Nils Vollertsen frá Myndlistfelagnum í Suðurjútlandi, eru takksom fyri hesa innbjóðing. Til framsýningina hava tey gjørt ein sonevndan leporello-tekst á donskum, føroyskum og íslendskum.

Tað er Norðurlendska kunningarstovan í Suðurjútlandi, sum hevur fingið sambandið í lag, og ætlanin við ferðandi framsýningini er at víðka um tey góðu mentanarligu sambond, sum longu eru millum Suðurjútlandi/Suðurslesvík, Føroyar og Ísland, siga fyrireikararnir.

Norðurlendska kunningarstovan hevur áður skipað fyri bókmenta- og evnistiltøkum, eins og ferðum til tey bæði londini í Útnorðri, har stórur áhugi altíð hevur verið.

Saman við Myndlistafelagnum í Suðurjútlandi fer Kunningarstovan nú at sýna fram verk hjá átta listafólkum úr Suðurjútlandi og Suðurslesvík. Framsýningarnar verða í Havn, Hafnarfirði og Akureyri.

– Tað er fyrstu ferð, at fólk hiðanífrá við dansk-týska markið taka stig til so stóra framsýning við donskum listafólkum í Føroyum og Íslandi, siga fyrireikararnir og leggja afturat, at harafturat er talan um eitt listarligt umbýti, við tað at norðurlendski listadepilin Mikkelberg í Hatsted í Suðurjútlandi eisini tekur ímóti eini framsýning við átta føroyskum listafólkum á vári 2004 og trimum íslendskum listafólkum á heysti 2004.

– Vit gleða okkum til hesar framsýningar og vóna, at tær vilja stuðla upp undir og menna sambandið við Útnorður og skapa sambond millum listafólk í sonevnda norðurlendska útjaðaranum, siga fyrireikaranir og sipa til dansk-týska markið og tey bæði londini í Útnorðri.


Catherine Sadolin

## Master class sangskeið

Í døgunum 23. - 25. januar 2004 verður skipað fyri master classs sangskeiði við Cathrine Sadolin í Norðurlandahúsinum. 15 fólk kunnu verða beinleiðis við í undirvísingini, meðan rúm er fyri hópin av áhoyrarum.

Freistin at tekna seg er úti fríggjadagin hin 9. januar 2004.

Tiltakið verður bæði Hellini og í Klingruni. Í báðum førum er gjørligt at vera áhoyrari og á tann hátt fáa innlit í ræddarvenjingar og sangteknikk á høgum støði.

Sangskeiðið er treytað av nóg stórari luttøku og tilmeldingarbløð eru á: www.petra.fo


Petra Iversen

**Skeiðið verður hildið soleiðis:**
fríggjadagin 23. januar 17:30 - 19.30
leygardagin 24. januar 10:00 - 12:00 & 14:00 - 17:00
sunnudagin 25. januar 14:00 - 17:00
- Gjøgnumgongd av teknikkum
- Spurningar frá salinum
- Coache 15

Kostnaður fyri Aktiv (15 fólk) er 1.500 kr.
Kostnaður fyri Passiv (áskoðarar) er 700 kr.
Gjaldast skal á konto 9181-139.56.12

Pláss er fyri 15 aktivum, sum fáa induviduella undirvising. Ein treyt fyri at kunna luttaka sum aktivur er, at tú ikki ert nýbyrjari og harumframt hevur ein heilt konkretan trupulleika, sum tú vilt hava hjálp til, eitt nú hvussu ein kann náða ein hægri, ella lægri tóna, ikki verða hásur av at halda ein langan fyrilestur, ella syngja eina ávísa strofu. Allir mátar at syngja eru galdandi og vælkomnir, frá heavy til klassiskt. Havið tónleikadømi við á fløgu, so sangurin kann verða greinaður. Takið 1-2 sangir, ella partar av sangi við, har trupulleiki er, umframt nótar og besifringar til pianistin.

Danska Cathrine Sadolin hevur givið út bókina Komplet Sangteknik (Shout Publishing), sum byggir á 15 ára gransking innan allar mátar at syngja uppá. Í hesum arbeiði hevur Sadolin varnast eina higartil ókenda skipan, ið liggur til grund fyri, hvussu vit brúka røddina. Bókin og virksemi hennara ger upp við vanahugsan og gongur nýggjar, óvæntaðar leiðir, har møguleiki er at geva øll hugsandi ljóð frá sær - uttan at skaða røddina.

Catherine Sadolin nýtir fýra eginleikar, sum natúrliga eru í øllum røddum. Hesar eginleikar verða nevndir neutral, curbing, overdrive og belting. Settir saman, fevna hesir eginleikar um allar mátar at syngja, tað verið seg klassiskt ella heavy. Eisini tá umrøður distortion, ral, growl, knekk, skríggj, hása rødd, luft í røddini og ornamenterandi teknikk. Verður bygt á ta tøkni, sum Catherine Sadolin nýtir, kunnu allar hesar ræddarvenjingar fremjast á skilagóðan hátt og uttan at skaða virðismiklasta amboð okkara - røddina.

Bók og skeið er ætlað leikum og lærdum, sum av álvara arbeiða við rødd og sangi, tað verið seg sangarar, blásarar, upplesarar, lærarar, læknar, talupedagogar og øll, ið hava trupulleikar av røddini og vilja arbeiða við hesum. Tó hava børn undir 16 ár ikki atgongd til skeiðið.

Fyrireikari er Petra Iversen (petra@kallnet.fo) úti á Bø í Kvívík.

Meira kann lesast um Catherine Sadolin á www.sadolin.net/dk


Úr filminum Nói, Albinói

## Nói, Albinói

Fyrsti filmurin, KLIPP sýnir í nýggja árinum, er úr Íslandi. Eins og í undanfarnu filmum henda veturin, er talan um ein ungan leikstjóra, Dagur Kári, sum ger fyrsta spælifilmin. Heitið er Nói, Albinói. Filmurin er um trupla dreingin Nóa, sum er albino og býr á bygd í Íslandi. Happing ger ikki tilveruna lættari. Hesin hugvekjandi, virðislønti filmur verður sýndur í Norðurlandahúsinum mikudagin hin 21. januar 2004 klokkan 20:00.

## Løgtingsvalið 2004

Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya senda beinleiðis frá valstríðnum.


Løgtingsvalið 2002